# Venjingar-uppgáva 8

Tað eru bara navnorð í hvørkikyni, sum fáa endingina *ð* ella *ið*, tá ið tey eru bundin.
**Set ring um hvørkikynsorðini í kassanum.**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| hundur | brekka | tal | geit | kurv | bál |
| kúgv | eyga | trøll | breyð | taska | stólur |

**Bend hvørkikynsorðini óbundin og bundin í talvuna niðanfyri.**

| Eintal – óbundið eitt | Eintal – bundið hitt | Fleirtal – óbundið fleiri | Fleirtal – bundið hini |
|---|---|---|---|
| **Dømi:** hús | hús*ið* | hús | hús*ini* |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |

Er hvørkikynsorðið í skákskrift óbundið ella bundið? **Set X.**

| | óbundið | bundið |
|---|---|---|
| Hann fór upp á *loftið* at leggja seg | | |
| Eitt *hús* var til sølu mitt í bygdini | | |
| Pápi mín fór oman í *neystið* at egna sær eina línu | | |
| Eg fekk so ilt í *knæið*, tá ið eg datt í gjár | | |
| Gentan hevur júst keypt sær eitt *skjúrt* til føroysku klæðini | | |
| *Skjúrtið* er reytt og svart | | |
| *Brævið* frá ommu kom í gjár | | |
| Eg legði øll klæðini inn í *skápið* | | |
| Mítt *skáp* er ikki serliga stórt, men eg fekk klæðini inn kortini | | |
| Eitt fitt, lítið *torvatrøll* gekk á gólvinum í morgun | | |
| *Torvatrøllið* var burtur, tá ið eg fór upp | | |

# Venjingar-uppgáva 8.1

**Gevið gætur**
Tá ið tit skriva setningar, sum skulu hava ávirki, mugu tit brúka sagnorð, sum taka ávirki (ávirkandi sagnorð).

**Skriva ein setning, har:**
- grundliðurin er eitt bundið hvørkikynsorð í eintali
- umsøgnin er í nútíð
- ávirkið er eitt navnorð

**Skriva ein setning, har:**
- grundliðurin er eitt óbundið hvørkikynsorð
- umsøgnin er í tátíð
- ávirkið er eitt bundið hvørkikynsorð

**Skriva ein setning, har:**
- grundliðurin er eitt fornavn
- umsøgnin er í nútíð
- ávirkið er eitt navnorð í hvørkikyni

**Skriva ein setning, har:**
- grundliðurin er eitt bundið hvørkikynsorð í eintali
- umsøgnin er í nútíð
- ávirkið er eitt navnorð í kvennkyni